felagskap við tykkum; har tilbiðja vit Gud í felag, deila Guds ord og har mennast vit í at virka í Heilaga Andanum.

Guds samkoma „ekklesia“ er nógv meira enn ein bygningur ella ein røð av tiltøkum í álmanakkanum – hon er Guds familja. Tá vit tosa um Filadelfia, er tað tí ikki bygningin á Landavegi 22 vit fyrst og fremst meina við, men vit meina við okkum sum samkomufamilju. Bygningurin er jú bert fysisku karmarnir fyri samkomufamiljuna, sum kemur saman at læra hvør av øðrum, bera byrðar saman, gleðast saman og vaksa saman. Tað er ikki bygningurin, men samkomufamiljan, ið er fortreytin fyri at vit kunnu venja okkum í at brúka tær gávur, Gud hevur givið okkum, so vit bæði kunnu tæna hvørjum øðrum og teimum, sum vit møta í dagligdegnum.

Tá vit nú koma saman aftur, er tað okkara bøn, at vit ikki bert koma saman av vana, men við einum hjarta, sum – eins og Dávid – gleðist um at savnast um Gud við fólki Guds. Vit ynskja ikki at skipa fyri aktivitetum ella undirhaldi, men alt okkara andaliga virksemi er við tí fyri eyga, at vit mennast og virka í ríki Guds, so vit kunnu „kunngera náðiár Harrans“ fyri okkara fólki. Tí eggja vit okkum øllum til at koma við einum opnum hjarta, sum letur Heilaga Andan tala, rætta, ugga og styrkja okkum. Til at vera tilvitað um at vaksa í okkara samleika í Kristusi, liva í hansara sannleika og at lata Heilaga Andan virka í okkum og ígjøgnum okkum.

Vit gleða okkum til at síggja tykkum øll, til at hoyra frá Gudi gjøgnum tykkum, til at kenna Gud tróna á okkara lovsangi, merkja Heilaga Andan virka millum okkum, og í felag at kunngera náðiár Harrans.

*NAA og AMD*

## Samkomudagur í bygdarhúsinum á Strondum



**Sunnudagin 6. september verður samkomudagur, har vit fara at hugna okkum saman frá morgni til kvølds.**

**Vit gleða okkum til dagin, har ommur, abbar, foreldur og børn, fara at verða saman ein heilan dag, bara við hugna.**

**Vit fara at eta saman, spæla saman, dansa og syngja saman og hugna okkum max.**

**Hesin dagurin er fyri alla familjuna.**

# Filadelfia

*„Himmal á jørð“*

## Eg var glaður, táið sagt varð við meg:
## „Vit skulu fara í hús HARRANS!“




Nú fara vit aftur inn í august mánað, ljósu summarnæturnar styttast og vit merkja, at ein nýggj árstíð nærkast. Eitt nýtt skúlaár stendur fyri durum og somuleiðis byrjar alt kirkju- og samkomuvirksemið, ið hevur ligið stilt í summar, skjótt aftur. Hetta er tískil ein tíð, sum gevur okkum størri og fjølbroyttari møguleikar at savnast um tað, sum hevur størstan týdning – Jesus Kristus og ríki Hansara.

Við hesum í huga, koma orð Dávids í Sálmi 122:1 fram fyri okkum: Eg varð glaður, táið sagt varð við meg: „Vit skulu fara í hús HARRANS!“

Tað var ein djúp gleði hjá Dávidi at fara til templið, tí har møtti hann Gudi. Har kundi hann tilbiðja, biðja og vera í nærveru Harrans saman við Guds fólki.

Vit liva tó ikki undir sama sáttmála sum Dávid, tí við Jesu deyða og uppreisn varð leiðin til Gud latin upp. Tá forhangið í templinum skrædnaði, varð greitt, at menniskju ikki longur skuldu koma til Gud gjøgnum eitt ávíst stað ella eitt jarðiskt tempul. Heilaga Andin býr nú í øllum okkum, sum trúgva á Jesus Kristus. Vit eru tempul Heilaga Andans, og tí kunnu vit altíð hava samfelag við Gud – heima, til arbeiðis, í skúlanum ella hvar vit enn eru.

Vit gleða okkum tí ikki til at koma á møti í Filadelfia aftur tí „har býr Gud“, nei – vit gleða okkum til at koma á møti aftur í Filadelfia, tí har hava vit andaligan

# AUGUST 2026

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sunnudagur | 2. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>Møti- og kaffivertar: Hans, David og Óluva<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Mariann |
| Mánadagur | 3. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Anfinn N.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 8. | Kl. 10.00 | **Reingerð:** Anna-May |
| Sunnudagur | 9. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>Møti- og kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/leiðari: Ása O.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I<br>Uppvørpa: Nóa<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: |
| Mánadagur | 10. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Ása O.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Mikudagur | 12. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 15. | | **Reingerð:** Nomi |
| Sunnudagur | 16. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting og inns. til húsið**<br>Møti- og kaffivertar: Gerd, Anfinn og Fríðbjørn<br>Ábyrgd/Leiðari: Mariann<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Jóhan Hendrk |
| Mánadagur | 17. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Anna<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Mikudagur | 19. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 22. | | **Reingerð:** Karin |
| Sunnudagur | 23. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møti- og kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Anna-May |
| Mánadagur | 24. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Mikudagur | 26. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Hósdagur | 27. | Kl. 20.00 | **Hugnaløta fyri kvinnur og ungar gentur**<br>Ábyrgd: Margreth og Linda |
| Leygardagur | 29. | Kl. 10.00<br>Kl. 11.30 | **Kafé við luttøku av toymi frá Logos Hope**<br>**Lærusveinaskúlin**<br>**Reingerð:** Áshild |
| Sunnudagur | 30. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møti- og kaffivertar: Hans, David og Óluva<br>Ábyrgd/leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Kurt Christensen |
| Mánadagur | 31. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd: Hildibrandur<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

*Samkomuleiðslubólkurin*